

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 07 - 2013

# Frakland greitt nei til skifurgass

Orkukollveltingin, sum er komin serstakliga í USA, í kjalarvørrinum á framleiðsluni av skifurgassi og olju, verður ikki veruleiki í Fraklandi, í hvussu so er ikki so leingi fosetin eitur Hollande. "Soleingi eg eri forseti verður ikki talan um at leita eftir og framleiða skifurgass," sigur franski forsetin Francois Hollande í eini samrøðu. Hetta skrivar heimasíðan E24 og endurgevur Dow Jones. Sambært E24 kemur mótstøðan móti skifurgassi orsakað av umhvørvisvandanum, her váðanum fyri grunnvatninum. Annars sigst Frakland at vera eitt av teimum mest áhugaverdu londunum í Europa, tá talan er um útvinning av skifurgassi. Hóast fraklendingar siga nei til skifurgass eru teir tó førir fyri at útvinna orku úr skifurgassi. Franski orkurisin Total er nevniliga partur av fleiri verkætlanum við skifurgassi kring heimin. Skifurgass hevur annars fullkomiliga broytt orkustøðuna hjá USA, sum er við at gerast sjálvbjargið og entá útflytari av orku, eftir at framleiðslan av hesum nýggja slagnum av gassi er vaksin sera nógv. Kjakið um skifurgass er framvegis ovarliga á skránni, og fleiri umhvørvisfelagsskapir vilja vera við, at henda framleiðslan skaðar almikið, serstakliga grunnvatnið í tí økinum tað verður tikið upp.